ítróttur

Nr. 22 • týsdagur • 31. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Feløgini hoykna undan

**Ov høg krøv og at kalla eingin smidligheit. Tað tykist vera niðurstøðan hjá føroyskum ítróttarfeløgunum. Sagt verður, at tað bert er ein spurningur um tíð, hvussu leingi feløgini orka at fáast við tunga útlendingamálið**

ÚTLENDINGAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ítróttarfólk og -venjarar skulu forvinna í minsta 2.096,60 kr. um vikuna (8.805,53 um mánaðin) frá ítróttararbeiðinum fyri at kunna fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Samstundis skulu hesi í mesta lagi forvinna 1.935,40 kr. um vikuna (8.128,50 kr. um mánaðin) frá framíhjástarvi í aðrari vinnu enn ítróttararbeiði.

Soleiðis var orðaljóðið í seravtaluni, sum varð gjørd um útlendsk ítróttarfólk, tá politisk semja at enda varð gjørd um, hvussu hesin bólkur av útlendingum skuldi viðgerast í samband við umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Tann semjan varð fingin í lag 30. september 2004, og var hetta ein av knútunum, sum komu í ljósmála, tá útlendingakjakið av álvara tók seg upp á heysti 2003.



*Enn er eingin ábending um, at kavabólturin við útlendskum ítróttarfólkum er í ferð við at steðga. Sum vit hava skilt, so verða fleiri mál í løtuni kannað á løgregluni*

### Ov høg minstukrøv

Ivaleyst mundu flestu politikarar halda - og helst eisini vóna – at tann parturin av útlendingaøkinum var vorðin greiðari og smidligari við hesum. Men tað munnu tó vera langt ífrá øll ítróttarfeløg í landinum, sum eru samd í hesum:

– Greiðari kanska, men ikki smidligari. Og næstan ógjørlig at liva upp til.

Somikið kontant eru boðini úr fleiri av feløgunum, sum vit hava tosað við um málið. Trupulleikin tykist púra greitt vera, at krøvini um inntøku frá ítróttarfeløgunum eru sett somikið høgt, at tað er sera trupult hjá feløgunum at hóra undan hesum. Snøgt sagt, so hava feløgini ikki ráð at hava fleiri útlendingar í starvi fyri nærum 9.000 kr. um mánaðin.

Samstundis verður trupulleikin gjørdur enn størri, tá talan er um mestaforvinning hjá øðrum arbeiðsgevara. Tað merkir, at arbeiðsgevarar í mesta lagi kunnu seta hesi somu fólk í hálvtíðarstarv, og eisini tað kann skapa trupulleikar. Hetta tí arbeiðsgevarin í allar flestu førum heldur vil hava fólkini í starvi fulla tíð. Og hóast talan kann verða um skiftandi arbeiðsstørv - t.d. á einum flakavirki - so nyttar lítið at hava starvsfólk, sum hava eitt lógarfest mark á tímatalinum. Altso har starvsfólkið noyðist at siga nei til arbeiði, hóast tey fegin vilja til arbeiðis. Og hóast arbeiðsgevarin í summum førum nærum skríggjar eftir arbeiðsmegi.

### Smidligheitin

Orðaljóðið í avtaluni millum Bertel Haarder og Jógvan við Keldu staðfestir ikki, at talan er um serliga smidliga skipan. Men politiski boðskapurin ta ferðina var klokkuklárur tann vegin. Og hóast semja var um, at krøvini vóru í yvirkantinum, so var avmarkað gleði at hóma í føroyskum ítrótti, nú ein serskipan hóast alt var fingin í rættlag.

Men tað man tó vera so sum so við smidligheitini. Dømi eru um, at tað framvegir tekur meira enn hálvt ár at fáa neyðugu arbeiðs- og uppihaldsloyvini. Og tað er nakað nógv meira, enn feløgini kunnu liva við at kalla.

Samstundis er í lógartekstinum ásett, at venjarar og ítróttarfólk kunnu vænta at verða send av landinum, eru tey farin undir virksemið, áðrenn endaligu loyvini eru fingin í rættlag. Í nógvum førum hevur praksis annars verið, at tá umsóknin er send inn, verður farið til verka. Tann leisturin er tó ikki í lagi sambært lógartekstinum, og skal bíðast í hálvt ár, hvørja ferð umsókn verður latin inn, fáa ítróttarfeløgini illa arbeitt yvirhøvur. Tað merkir í veruleikanum, at hond- og flogbóltsfeløg longu nú skulu gera avtalur við útlendskar spælarar fyri komandi kappingarár. Og tað er ein uppgáva, sum er meira ella minni vónleys hjá føroyskum ítrótti.

Tí kann avleiðingin væl verða, at talan í veruleikanum gerst um eitt útlendingastopp, áðrenn alt ov leingi. Eitt stopp, sum meira ella minni er avleitt av umsingar- og fíggjarligu hørðu krøvunum, sum føroysk ítróttarfeløg skulu liva upp til.

Fyrsti dómurin um ólógliga arbeiðsgevaraváttan fall longu í heyst, tá HB-formaðurin fekk treytaðan dóm á sín kappa. Næstu dómsviðgerðirnar eru í væntu, og so er spurningurin, hvussu leingi leikfólkini, sum standa handan flestu ítróttarfeløgini tíma og orka at fáast við lógartekstin.

## Skattavaldið skal kunnast

Kravið til ítróttarfeløgini – tá tosað verður um samsýning til útlendsk ítróttarfólk - er rættiliga greitt. Hesi skulu forvinna í minsta lagi 8.805,53 kr. um mánaðin í starvinum sum ítróttarfólk.

Í hesi upphædd kunnu roknast allar útreiðslur, sum felagið avheldur vegna ítróttarfólkið. Eitt nú ferð til Føroya, virði av fríum bústaði, fríum bili og øðrum fríum ágóðum.

Í hesum er tó vert at bíta merki í, at fríu ágóðarnir eisini skulu uppgevast skattavaldinum. Verða teir ikki tað, so telja upphæddirnar ikki við í roknistykkinum yvir løn, og hartil er talan tá eisini um brot á skattalógina.

Er talan um fríar ágóðar, so merkir hetta við øðrum orðum, at skattur skal rindast av fríu ágóðunum. Tann skattin kann felagið átaka sær at gjalda, ella eisini skal hann gjaldast av móttakaranum.

**-mørk**

---

## Munur á útlendingum

Tá semjan um framleingjan av arbeiðsloyvum varð gjørd, merkti hetta samstundis, at virðið á teimum útlendsku ítróttarfólkum, sum longu vóru í landinum, hækkaði munadi.

Hesi vóru nevnliga komin inn, áðrenn umsitingin brádliga herdi krøvini. Og treytað av, at tey hildu seg til sama arbeiðspláss, gjørdist talan nú um lagaligar treytir fyri framleingjan.

Við øðrum orðum, so gjørdist brádliga munadi meira lokkandi hjá ítróttarfeløgunum at fáa hesi fólkini knýtt at sær, tí her var einki krav um samsýning frá felagnum. Samstundis standa hesi fólk eisini í serstøðu, tí tey hava ikki mark fyri, hvussu nógv tey kunnu forvinna aðrar vegir.

**-mørk**

# Fótbólturin fær trupulleikar

**Tað er væl hugsandi, at kravdu FIFA-reglurnar gera umsitingina av útlendingaøkinum enn truplari fyri føroysk fótbóltsfeløg**

ÚTLENDINGAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á komandi aðalfundinum hjá FSF verður eitt av málunum nýggju krøvini, sum limalondini hjá altjóða fótbóltssamgonguni, FIFA, skulu liva upp til.

Ein partur av hesum krøvum eru sonevndu transfer-vindeyguni. Tað vil siga avmarkað tíðarbil, har spælarar kunnu skifta millum feløg.

Her er lagt upp til, at tað í framtíðini verður so, at øll spælaraskifti skulu vera skrásett áðrenn 31. januar. Og verður tað galdandi, so verður at kalla vónleyst hjá føroyskum fótbóltsfeløgunum at kn‡ta útlendingar at hópinum í framtíðini. Í øllum førum, so leingi sum útlendingalóggávan verður umsitin, sum hon verður í løtuni.

### Loyvini skul vera í lagi

Ein av treytunum, sum verður sett fyri at útskriva spæliloyvi frá FSF er, at viðkomandi skal hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Men við tungu málsviðgerðini á útlendingaøkinum er nærum vónleyst hjá feløgum at tryggja sær, at hesi loyvi er fingin í rættlag innan 31. januar. Hóast batar í málsviðgerðartíðini, so eru enn dømi um spælarar, sum hava bíðað í upp til hálvt ár eftir loyvum. Tað vil við øðrum orðum siga, at føroysk longu nú skulu leggja sær til rættis, hvørjar útlendingar tey møguliga hugsa um at hava í hópinum til kappingarárið 2007! Og tað er sjálvandi ikki ein støða, sum feløgini meta seg kunna liva við.

Enn eru FIFA-krøvini tó ikki sett í verk. Og sambært aðalskrivaranum í FSF, Ísak Mikladal, so verður eisini arbeitt við at loysa trupulleikan.

– Stjórnarfundur verður í ÍSF í næstum, og tá er hetta eitt av mállunum, sum verður tikið upp. Tí hetta er ikki bara ein trupulleiki fyri fótbóltin. Tað er ein trupulleiki, sum allur føroyskur hevur, og tí eigur og skal ÍSF verða partur av loysnini, sigur Ísak.

Hann dugir tó ikki at siga nakað um, hvussu ein loysn kundi sæð út. Men staðfestir bara, at verandi støða í øllum førum er ótolandi hjá feløgunum.